# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800




## Hvussu fáa vit tey ungu at støðast?

Vit hava í bestu tiðum upplivað at havt nettofráflyting av fólki. Hetta burdi fingið alt tað politiska umhvørvið at ressast, tí um fólkatalið fellur í uppgangsárum, hvussu fer ikki at vera í fellisárum? Vit vita av søguligum royndum, at føroyingar eru kvikir at stinga í sekkin, um tíðirnar versna munandi. Vit mistu meir enn 10% av fólkatalinum í einari kreppu, sum vardi minni enn tvey valskeið, og lítið er at ivast í, at slíkt kann endurtaka seg, um illa veit við.

Nú er tað sjalvandi ein partur av teimum, sum fara av landinum, ið bert fara fyribils í útbúgvingarørindum. Hetta er gott, tí tað er sunt fyri Føroyar at hava vælútbúgvið fólk, sum hava sæð heimin uttanfyri landoddarnar. Spurningurin er so bara, hvussu vit fáa hesi fólk heimaftur, heldur enn at tey vera verandi í øðrum londum.

Seinnu árini er mynstrið eisini broytt. Fleiri og fleiri ungfólk velja at nema sær útbúgving uttanfyri Danmark. Hetta er frálíkt. Vit liva í einum heimi, sum verður støðugt meira altjóðagjørdur, og tá er umráðandi at hava vælútbúgvið fólk í Føroyum, sum dugir at venda sær í nógvum ymiskum mentanum og málum.

Tað at mynstrið broytist, broytir eisini krøvini til Føroyar, um landið skal gerast lokkandi hjá ungum vælútbúnum fólki at flyta heimaftur til. Fyrr, tá so at siga øll nomu sær hægri útbúgving í Danmark, so var eitt sindur einfaldari at vita, hvat Føroyar hevði at kappast við. Nú sløðast føroysk lesandi nógv meiri víða, og tí er samanberingargrundarlagið hjá føroyskum lesandi nógv meira fjølbroytt enn nakrantíð fyrr.

Tað nyttar ikki longur bert at hyggja at donskum skipanum, tí tað er als ikki vist, at tað er tað, sum við tíðini kemur at trekkja tey ungu heimaftur. Ein kanning var gjørd herfyri, sum vísti, at livikostnaðurin í Danmark lá umleið 40% omanfyri miðalið fyri ES. Um Danmark liggur umleið 40% omanfyri, so liggja Føroyar helst enn longur uppi. Hvussu lokkandi er hetta fyri føroyskar útisetar? Serliga, tá hugsað verður um útisetar uttanfyri Danmark, sum støðugt økjast í tali.

Sjálvandi vil tað altíð vera dýrt at liva í Føroyum, men spurningurin er, um vit hava røttu balansuna í løtuni. Okkurt er í hvussu so er galið, tá fólk í bestu tíðum flyta av landinum í øðrum enn útbúgvingarørindum.

Hetta verður ikki politiskt viðgjørt í løtuni. Heldur ikki millum valevni. Tey kappast bert um at fortelja, hvat vit skulu fáa afturat av øllum møguligum útreiðslupostum á fíggjarlógini, sum skal lokka fólk heimaftur. Eingin tosar um, hvat kann hava stygt seinastu tvey árini, og hvat tann meira altjóðagjørdi ungdómurin fer at samanbera við um 10 ár. Tað verður neyvan bert Danmark.

**Sosialurin**

# All I can hear: I, me, mine...



**SÍÐULINJAN**
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



Altjóðagerðin skolar av sonnum inn yvir okkum í hesum tíðum. »Amerikanskir tilstandir« er vorðin er partur av málinum og verður sagt um alt tað, ið ikki er grótføroyskt. Og nú eru vit eisini farin at uppliva amerikanskt valstríð í Føroyum.

Traditionelt eru bert tveir flokkar í USA, demokratarnir og republikanararnir. Og tí er tað rættiliga einfalt hjá amerikanarum at velja. Teir eru ongantíð í iva um, hvørjum flokkarnir standa fyri, og tí hevur spurningurin altíð hjá teimum verið ein spurningur um persónar. Clinton ella Obama. Rumney ella Huckabee. Clinton ella Rumney, Obama ella Huckabee. Persónurin hevur ofta meiri at siga, enn traditionellu floksvirðini.

Í Føroyum hevur tað hinvegin oftast verið so, at tú velur eina floksideologi, sum samsvarar best til tína egnu sannføring. Og so hyggur tú teg um, hvørji valevnini eru. Ella soleiðis hevur tað vanliga verið til løgtingsval.

Til fólkatingsval hevur hinvegin ofta verið fokuserað upp á persónin. Ofta í minst líka stóran mun sum flokkin. Tí har eru at kalla bert tveir møguleikar: Antin verður tín persónur valdur, ella er atkvøðan burturspilt.

Nú eru Føroyar eitt valdømi, eins og til fólkatingsval. Og valstríðið líkist eisini einum fólkatingsvalstríði. Nú verður ikki longur heitt á fólk um at seta krossin við ávísan lista. Nei, nú verða fólk biðin um at atkvøða persónliga.

Nú enda valtalurnar ikki: Setið kross tykkara við X-flokkin, ella eitt av valevnum hans. Nú eitur tað: Vel meg. Undirforstaðið ella beinleiðis.

Eisini fíggjarliga er valstríðið broytt munandi. Nú fíggja valevnini í nógv størri mun egið valstríð. Tí eru tað eisini lutfalsliga fáar, men risastórar plakatir, ið dominera í landslagnum.

Flokspolitikkurin er settur til viks eina stund, meðan funnið verður út av, hvussu tinglimabýtið fer at síggja út hjá ymsu flokkunum. Reshuffle.

Men tað er jú ikki neyðturviliga nakað forgjørt í, at ymsu valevnini royna at profilera seg sjálvi. Tað kann jú saktans verða, at tey sum ynskja tað mest, eisini eru tey, sum vilja arbeiða harðast fyri sakini. Tað kann jú eisini verða, at tey, sum profilera seg sjálvi mest og verða vald, eisini eru tey best egnaðu.

Valstríðið er jú flutt frá ofta hugnaligu valfundunum kring landið í fjølmiðlarnar. Útvørp, sjónvarp og bløð. Og tað er í stóran mun Kringvarpið, sum hevur stýrt valstríðnum seinastu valini. Tí er neyðugt hjá flokkum og ikki minst valevnum, at gera vart við seg á annan hátt.

Sum ført verður fram: Hvat kanst tú útrætta í hálvan ella heilan minutt í útvarpinum ella sjónvarpinum, um tað er einasta eksponering, tú fær í øllum valstríðnum. Tí er ein møguleiki hjá valevnunum at seta fokus á seg sjálvi við stórum plakatum. Til dømis. Ella við at gera, sum Tjóðveldi og Sambandið nú gera, fara í hólmgongu flokkana millum. Við møguleika at presentera síni valevni í nógv størri mun og á nógv bíligari hátt enn annars.

John F. Kennedy segði í sínari innsetanarrøðu 20. januar 1961 kendu orðini: Spyr ikki, hvat land títt kann gera fyri seg – spyr hvat tú kann gera fyri land títt. Hugsar nýggja ættarliðið av politikarum soleiðis, eru vit jú slett ikki so illa farin.

Verri er, um orðini hjá líka kenda Beatles er tað, ið drívir verkið, tá teir siga: All, I can hear: I, me, mine, I, me, mine, I, me, mine...

**Á SÍÐULINJUNI gera blaðfólk á Sosialinum viðmerkingar í sambandi við løgtingsvalið**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.